*Leiðbeining til umsóknarblað*

Ynskir ein borgari/húski/virki at fáa sær eina jarðhitaskipan ber til at fáa fatur á umsóknarblaði frá avvarandi kommunu. Tað ber eisini til at taka umsóknarblað og leiðbeining niður av heimasíðuni hjá Jarðfeingi www.jardfeingi.fo

Tað er skilagott at lesa vegleiðingina til umsóknina, so hvørt umsóknarblaðið skal fyllast út.

Teigur 1: Útfyll navn, bústað, telefonnummar og matrikkul til stykkið.

Kunngerð um jarðhitaskipanir kom í gildi 26.oktober 2012, sum ásetir krav um at brunnborari og hitapumpuinstallatørur skulu vera góðkendir. Tað vil siga, at umsøkjari skal seta seg í samband við bæði brunnborara og ein hitapumpuinstallatør. Hetta kann gerast í einum, har sum hitapumpuinstallatørur hevur avtalu við brunnborara.

Teigur 2: Brunnborari váttar at gera arbeiðið og vísir á hvar, á grundstykkinum holið skal vera. Ein tekning, har boriholið er staðsett, skal latast inn til kommununa saman við umsóknini. Tað er neyðugt, at undirskift brunnborarans er á umsóknini.

Hitapumpuinstallatørur skal fylla út teig 3 í umsóknarblaðnum. Tað er eisini neyðugt, at undirskrift frá hitapumpuinstallastøri er á umsóknini.

Yvirlit yvir góðkendar brunnborarar og hitapumpuinstallatørar sæst á heimasíðuni www.jardfeingi.fo

Tá teigarnir 1-3 eru fyltir út, kann umsóknin latast kommununi.

Teigur 4-5: Kommunan sendir umsóknina til ummælis hjá Jarðfeingi. Jarðfeingi hevur eina yvirlitsskipan yvir allar jarðhitaskipanir í Føroyum. Jarðfeingi viðger umsóknina og sendir kommununi svarið. Kommunan gevur endaligt loyvi til jarðhitaskipan.

Tá umsøkjarin hevur fingið hetta skjalið aftur frá kommununi, er klárt til at fara í gongd við arbeiðið.

Teig 6 hevur brunnborarin ábyrgdina av at fylla út og at undirskriva. Tað er lógarkrav at hesir upplýsingar verða sendir kommununi.

Tað er eisini lógarkrav, at ein góðkendur hitapumpuinstallatørur undirskrivar eina viðlíkahaldsavtalu við eigaran í teigi 7. Tað er ábyrgd umsøkjarans at finna góðkendan hitapumpuinstallatør til at undirskriva eina viðlíkahaldsavtalu av skipanini.

Tað er umráðandi, at umsøkjarin sendir avrit av umsóknarskjalinum aftur til kommununa.